Bryggjaríini vilja bryggja sterkt øl

Bæði tey føroysku bryggjaríðini hava søkt Vinnumálastýrið um at fáa lovyi at bryggja øl sterkari enn 5,8% – bert ætlað til útflutnings

STERKT ØL
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

– Tað er lættari at sleppa inn á hyllarnar í handlum í Norðurlondum við sterkum øli – vit tosa um ein stóran marknað, sum bryggjaríini í løtuni ikki kunnu troyta við núverandi hámarki uppá 5,8%. Hetta siga bæði føroysku bryggjaríini, Føroya Bjór og Restorffs Bryggjarí í kunningarskrivi.

Bryggjaríini vænta, at heimamarknaðurin fer at minka orsakað av broytingartíðum, og heldur hann tað tí vera sera neyðugt at hugsa um útflutning av sterkum øli.

– Hetta vil verja og skapa nýggj arbeiðspláss og bøta um handilsjavnan, siga tey.

Bryggjaríini vísa á, at tað ikki er neyðugt at broyta rúsdrekkalógina.

– Loyvið til at bryggja sterkari øl krevur bert eina lítla víðkan av galdandi lóg.Henda broytingin vil ikki viðføra nakrar soaialar vansar og heldur ikki økta fyrisiting.

Bryggjaríini vísa eisini á, at í okkara alsamt størri globalisering av vinnulívinum er tað møtimikið, at lokalar føroyskar lógir skulu forða fyri framleiðslu og útflutningi.

– Vit hava ta tiltrúgv til okkara vinnumálaráðharra, at hann fremur ynsktu broytingina, føroysku bryggjaríunum og føroysku arbeiðsplássum at frama, siga bæði føroysku bryggjaríini í, Føroya Bjór og Restorffs Bryggjarí, í kunningarskrivinum.

Fiskivinnuframsýning í Moskva

Nú fáa føroyskar fyritøkur møguleika fyri at hitta og knýta sambond við russiskar fyritøkur. Menningarstovan hevur í samstarvi við Skipafelagið Føroyar og russiska konsulátið í Føroyum gjørt av at luttaka á fiskivinnuframsýning í Moskva 21. - 24. apríl í ár. Somuleiðis verður skipað fyri handilsferð í sambandi við tiltakið. Framsýningin verður væl vitjað, m. a. av russiskum reiðaríðum, sum Skipafelgið Føroyar, Árni Dam og Ivan Eginsson, persónliga hava sett seg í samband við.

Handilssáttmálin millum Føroyar og Russland, sum væntandi skjótt verður undirskrivaður, fer at skapa møguleikar fyri størri samhandli við Russland.

Fleiri føroyskar fyritøkur hava víst áhuga fyri at vera við á framsýningini, og ivaleyst eru enn fleiri, sum kundu fingið gagn av størri samstarvi við russisk reiðarí og russiskar fyritøkur. Higartil hava fyritøkur, sum á ein ella annan hátt eru veitarar til fiskivinnuna víst áhuga. Til dømis frystigoymslur, havnarmyndugleikar, veitarar av útgerð og tænastum til russisk fiskiskip. Aðrar vinnur, t. d. byggivinna, fiskaseljarar og onnur eru eisini vælkomin til at vera við.

Til ber at kunna seg um framsýningina á http://www.amscort.ru/fish/eng/

Formaðurin í trivnaðarnevndini á Hotel Tórshavn framman fyri stásiliga minibussin, sum er keyptur til Hotel Tórshavn.
Mynd:: Simun J. Hansen

Hotel Tórshavn fingið minibus

Bussur er nú keyptur til Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn, ið hýsir føroyingum á sjúkuvitjan í Keypmannahavn

SJÚKLINGABUSSUR
Símun J. Hansen

Herfyri varð ein minibussur keyptur til Hotel Tórshavn í Keypmannahavn. Bussurin, ein 8 ára gamal Mercedes Sprinter 214, er til 9 persónar og hevur lift til fólk, sum sita í koyristól. Bilurin er ein bensinbilur við automatiskum kervi og automatiskari svaliskipan. Góð dekk fylgja við á sportfelgum og hampuliga góð vetrardekk eru undir bilinum.

Stigið at keypa ein bil varð tikið av Kára Petersen, sum hevur vitjað á Hotel Tórshavn nakrar ferðir. Hann legði til merkis, at nógv av teimum, sum búðu á hotellinum ikki sluppu so lætt runt í býnum, og avgjørdi tí at stovna eina trivnaðarnevnd í Keypmannahavn og ein trivnaðargrunn í Føroyum við tí endamáli at keypa ein minibuss.

Talan er kortini ikki um eina fasta flutningsskipan, men hetta er ætlað sum ein hjálp hjá teimum, sum búgva á sjúklingahotellinum, um tey t. d. skulu onkran túr í frítíðini.

Í nevndini í Føroyum sita Kári Petersen, formaður, Dánjal Joensen, kassameistari, Erland Viberg Joensen, skrivari, Gudna Midjord og Petur Mohr Reinert.

Í nevndini í Danmark sita Niels Jacob Nielsen, formaður, Øssur Berghamar, Ina Fristal, Martin Fjallstein og Bergljót Midjord.

Trivnaðarnevndin í Danmark fór í september í holt við at arbeiða við myndugleikunum í Danmark fyri at fáa ein avgjaldsfrían bus til Hotel Tórshavn, men tað eydnaðist ikki. Hetta við tí úrsliti, at um ein nýggjur bussur skuldi keypast, fór hann at kosta tívliga 800.000 kr, og henda ætlanin varð tí slept.

Men nevndin gav ikki upp. Avgerð varð tikin um at leiga ein minibuss annaðhvørt vikuskifti, fyri at vita, um brúk var fyri bussinum og um áhugi var fyri ætlanini.

29. novembur var fyri fyrstu ferð ein bilur leigaður, soleiðis at vitjandi á sjúklingahotellinum kundu støkka inn á gólvið á nýggju Norðuratlantisku bryggjuni. Koyrt varð eisini runt í býnum - m.a. til Fiskatorgið, Blá Pakhus og Amalienborg. Undirtøkan var so góð, at síðan 29. novembur hevur trivnaðarnevndin fimm ferðir leigað minibuss til Hotel Tórshavn. Ein túrur hevur eisini verið til Frederiksborg slot og ein túrur til Helsingør umframt ta vanligu koyringina.

Asberg Johansen, sum er ein teirra, sum umboðar Mercedes í Føroyum, var fyri nøkrum vikum síðani í Danmark og var ein túr við Niels Jacob Nielsen, sum var bilførari henda dagin. Asberg bjóðaði seg at kanna marknaðir fyri brúktar bilar og ringdi longu mánadag við einum tilboð upp á ein minibuss fyri 195.000 kr. Bilurin var mettur at vera væl hóskandi til endamálið, og nevndinar avgjørdu at keypa hendan minibussin. Nøkur setur skuldu setast í bilin, og sjálvandi skuldi hann eisini gerast klárur á annan hátt. Hósdagin 4. mars var bilurin handaður trivnaðarnevndini á Hotel Tórshavn.

Niels Jacob Nielsen sigur, at hann er sera væl nøgdur við bilin, og hann hevur longu verið nógv nýttur. Gott hevði verið við einum fløguspælara og einari GPS skipan, soleiðis at tað verður lættari at finna runt í Keypmannahavn. Kostnaðurin á hesum er umleið 7.000 kr.

Hann leggur aftur at, at navnið Hotel Tórshavn átti verið broytt til Sjúklingaheimið Tórshavn. Á tann hátt hevði tað verið lættari at greitt fólki á gøtuni og myndugleikum sum heild, frá arbeiðinum á Hotel Tórshavn. Fólk halda at tað er handilsvirksemi, sum talan er um, altso eitt rættligt hotel, og tað tekur ofta langa tíð at greiða frá, hvussu arbeiðið á Hotel Tórshavn hongur saman.

Trivnaðarnevndin fer nú at finna bilforarar, sum skulu góðkennast av nevndini, og fer at arbeiða við at fáa skipanina at virka so væl sum gjørligt.

Verkamannafylkingin og Føroya Sparikassi hava latið ávíkavist 87.000 kr. og 100.000 kr. Síðani er peningur komin frá fleiri kommunum, virkjum, Lions Club í Tórshavn og fleiri einstaklingum sum m. a. hvønn mánaða lata eina ávísa upphædd til trivnaðargrunnin. Hettar er sjálvandi við til at tryggja tiltakið framyvir.

Niels Jacob Nielsen takkar vegna trivnaðarnevndina á Hotel Tórshavn inniliga fyri gávuna úr Føroyum.

Fjórða árið við tulipanum frá Lions Club

TULIPANTILTAKIÐ
LC Tórshavn

Nei til narko er herrópið, tá ið lionslimir í Havn næstu vikuna seta seg í samband við virki og fyritøkur í Suðurstreymoy og heita á tey at keypa tulipanir.

Endamálið er at savna inn pening til góðgerandi endamál, men eisini at seta fokus á vandan við narkotiskum evnum.

Seinastu árini hevur Lions í Føroyum regluliga skipað fyri skeiðnum Lions Quest, sum serliga er ætlað fólkaskúlalærarum. Endamálið við Lions Quest er at geva børnum og ungum lívsvirði og sjálvsálit, so at teir m.a. betur duga at siga nei til rúsevni.

Næsta Lions Quest skeiðið verður 20. og 21. apríl í ár. Nøkur fá pláss er eftir, um onkur er, sum hevur hug at taka lut. Tulipantiltakið figgjar m. a. áðurnevnda skeið. Tulipantyssini, sum heitt verður á virki og stovnar at keypa, kosta 250 kr. Ætlanin er so, at tyssið saman við einum skelti við áskriftini Nei til narko skal standa frammi á sjónligum staði í vikuni fyri páskir.

– Hetta er 4. ferð, at vit skipa fyri tiltakinum. Í fjør vórðu seld um 500 tyssi, sigur Niels Nattestad, formaður í LC Tórshavn.

Hella kom í eina íðu

Glastrevjabáturin Hella kom í eina íðu í Nólsoyarfirði, og tað var orsøkin til at báturin sakk, staðfestir Skipaeftirlitið

Glastrevjabáturin Hella kom í eina íðu. Báturin tók sjógv inn aftan, motorurin steðgaði og gjøgnum opnu hurðina kom sjógvur fram í stýrhúsið, áðrenn hann sakk. Alt gekk sera skjótt fyri seg, og Gudmund Isfeldt hevði ikki stundir til at koma sær í bjargingarbátin, staðfestir Skipaeftirlitið

VANLUKKA
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo

Orsøkin til syrgiligu vanlukkuna í Nólsoyarfirði 7. januar, tá glastrevjabáturin Hella við eigaranum Gudmundi Isfeldt umborð sakk, er nú staðfest.

Gudmundur Isfeld hevur verið í arbeiðsørindum í Nólsoy og var á veg til havnar aftur við báti sínum henda seinnapart í januar. Vindmegin er umleið 12 m/s av landsynningi sunnan við hvirlum upp í 18 m/s. Tað regnar illa og er yvirskýggja, og streymurin er harður suður gjøgnum fjørðin.

Eftir at hava ráðført seg við staðkent fólk fer Hella klokkan eitt korter til trý úr Nólsoy og setur kósina móti Buchvald. Gudmundur Isfeld skal stýra móti Buchvald, til hann kemur inn um streymstrongin, og síðan snara suður við Streymoyarlandinum.

Úr Nólsoy verður fylgt við glastrevjabátinum, og haðan sæst, at tá komið er móti Streymoyarlandinum, verður kósin løgd suður fram við landi. Men síðan hvørvur Hella í einum grovum æli.

Avtalað var við fólk í Nólsoy, at Gudmundur Isfeldt skuldi boða frá, tá hann kom til lands. Men tá eingi boð eru komin ein tíma eftir at hann fór úr Nólsoy, boða nólsoyingar frá. Síðan verður farið at leita, men ikki fyrr enn fýra dagar seinni, tann 11. januar, verður Hella, ið er eitt frambygt áttamannafar frá 1975, funnin á botni.

Ein íða tók Hellu

Skipaeftirlitið hevur kannað, hvat fór fram í Nólsoyarfirði hesa lagnuløtu. Niðurstøðan er, at Hella er komin í eina íðu, júst sum hon hevur snarað og ætlað at siglt fram við landi. Báturin hevur tikð sjógv inn aftan, og motorurin er steðgaður. Fyrst er afturendin á bátinum sokkin, og sjógvur er komin inn í stýrhúsið gjøgnum opnu hurðina.

Nógvi sjógvurin hevur elvt til so stórt trýst inni í húsinum, at teir fimm rútarnir eru trýstir út. Og full av sjógvi hevur uppdriftin í Hellu ikki klárað at hildi henni flótandi.

Alt gekk sera skjótt fyri seg, og Gudmundur Isfeldt hevur lítla tíð at umráða seg.

Bjargingarbáturin

Ikki fyrr enn 16. januar varð gummibáturin av Hellu funnin, stutt úr landi sunnan fyri Akraberg. Tá hekk maðurin íbundin útloysaralínuna.

Í sínum kanningum staðfestir Skipaeftirlitið, at bjargingarbáturin tá hevði verið uppblástur í umleið fimm samdøgur. Tað vil siga síðan umleið 11. januar, ella fýra dagar eftir at Hella sakk. Tí ber til at staðfesta, at Gudmundur Isfeldt ikki hevur megnað at útloysa bjargingarbátin.

Hol í skrokkinum

Tá Hella varð tikin upp vísti tað seg, at hon hevði eitt stórt hol í bakborðssíðu, beint framman fyri miðskips. Men holið er komið, tá Hella hevur rakt botn, staðfestir Skipaeftirlitið, hvørs kanningar somuleiðis vísa, at tað ikki er grundað á veikleikar í skrokkinum, at Hella er sokkin.